## VIÐMERKINGAR

# Smyril kann rekast bíligari og betri nærri brúkaranum

**Hergeir Nielsen**



Fjøld av fólki hevur spurt meg, hvussu gekst við málinum um at leggja umsitingina av Smyrli nærri brúkarunum. Eingin sigur seg hava hoyrt nakað, lisið nakað ella sæð nakað um viðgerðina av málinum í fjølmiðlunum.

Hví føroyska pressan ikki heftir seg við tað einasta løgtingsmálið, sum er viðgjørt av nývalda løgtinginum, fái eg tíverri ikki svarað fyri.

Heldur ikki fái eg svarað fyri, hví vit tjóðveldismenn verða burturtagdir í øðrum málum eisini, men týðiligt er, at heilt nógvir lesarar, lurtarar og hyggjarar saknað nakað nógv av óheftum tíðinda- flutningi úr nývalda løgtingi okkara.

25. februar fekk málið um Smyril drúgva viðgerð á tingi. Á heimasíðu míni, www.hergeir.com, havi eg greitt frá framløguni, og á www.logting.fo kann lurtast eftir viðgerðini av tingmáli nr. 29/2003.

**Landsstýrismaðurin breyt tingskipanina**

Uppskotið um at flyta ein part av umsitingini av Strandfarskipum Landsins til Suðuroyar skal lutvíst síggjast í ljósinum av, at tað bæði er rímiligt og fyrimunarligt, at henda almenna umsiting liggur so nær brúkarunum sum gjørligt, og í ljósinum av, at útjaðarin eigur sín rímiliga part av teirri almennu føroysku umsitingini.

Hetta lógaruppskotið um flyting av umsitingini av Smyrli skal í triðja lagi síggjast í ljósinum av uppskoti mínum undir viðgerðina av løgmansrøðuni 2003, og í fjórða lagi í ljósinum av einum fyrispurningi, sum eg setti landsstýrismanninum í vinnumálum tann 19. nov. í fjør.

14 yrkadagar og 6 tingfundir seinni var framvegis eingin fyrispurningur svaraður, so sum tingskipanin annars fyriskrivar sum seinasta freist fyri svari, og varð tí málið nú sett fram nú í lógarlíki.

**Hvat sigur lógaruppskotið?**

Lógaruppskotið gongur í stuttum út uppá at flyta alla umsiting av nýggja suðuroyarskipinum, íroknað rakstur og planlegging, til Suðuroyar, nú tá ið tað nýggja skipið kemur í sigling.

Tænastustigið á Suðuroyarleiðini er bøtt nakað væl, í og við at vit hava hækkað túratalið upp í tvær ferðir um dagin hvønn dag í vikuni, meðan ætlanin við nýggja Smyrli var at røkka enn longur framá í setningi okkara frá 1998 um at dagføra siglingina um Suðuroyarfjørð við enn hægri túratalið.

Og ráðini til enn meiri sigling finna vit í sparingum í rakstrinum annars.

Smyril er størsta ferðamannskipið í almenna reiðarínum og lívæðrin hjá suðringum á samferðsluøkinum, og tað nýggja skipið, sum vit strektu kjølin til við sáttmála frá 9. apríl 2002, er enn størri og ávegis.

Tað nýgja skipið er nakað størri enn tað verandi, tað gongur skjótari, og sáttmálakostnaðurin er 40,45 mió evrur, ella um 300 mió. kr., og var ætlan okkara, at rinda seinasta triðingin av sáttmálakostnaðinum á hesari fíggjarlógini í sambandi við, at skipið kemur í sigling í oktober í ár.

Sum fyrr nevnt, so er eisini almenni hugburðurin og tíðin komin hartil, at vit í útjaðaranum fáa part í lønarinntøkunum og sosialu menningini av almenna samfelagsrakstrinum.

Og víst verður í uppskotinum til, at tað at flyta ein part av reiðaravirkseminum hjá SL til Suðuroyar ikki kostar meira enn at reka fyritøkuna í Havn, heldur minni.

**Ógvusligur lønarvøkstur**

Roknskapartølini hjá Strandfaraskipum Landsins vísa ein ógvusligan lønarvøkstur upp á heili 44% yvir 5-ára skeiðið 1998 - 2002.

Talan er um ein lønarvøkstur úr 50 upp í 72 mió.kr., ella 22 mió.kr. Lønarhækkingin á almenna arbeiðsmarknaðinum er bara 7,5 mió.kr. av hesi upphædd, meðan restin so ivaleyst er til nýtt til annað virksemi av ymiskum slag.

Lønir v.m.

| | |
|---|---|
| 1998 | 50 mió.kr. |
| 1999 | 54 mió.kr. |
| 2000 | 62 mió.kr. |
| 2001 | 69 mió.kr. |
| 2002 | 72 mió.kr. |

Hyggja vit í løgtingsfíggjarlógaruppskotið fyri 2004, so síggja vit har, at almenna reiðaríiðið lønar 180 fulltíðarstørvum og at lønarparturin er 72 mió.kr. Her má so vera talan um mánaðarlønta partin av reiðarínum, meðan eini 100 ársverk í tímalønum so koma afturat teimum 180 føstu lønunum.

Strandfarskip Landsins hava sostatt eini hálvttriðja hundrað ársverk á lønarlistanum.

**Roknskaparlig sundurgreining**

Ársroknskapurin hjá SL er sundurgreinaður í felags fyrisiting, oyggjaleiðir, bygdaleiðir, og farmaleiðir.

Samlaði lønarmassin hjá reiðarínum er sum áður nevnt 72 mió.kr., og fara tær 42,7 mió.kr. til rakstur av oyggjaleiðunum, harav Suðurleiðin einsamøll kostar 16,1 mió.kr. í lønum.

16 mió.kr. í lønum geva úti við 70 ársverk, sum sostatt kunnu roknast at vera knýtt at Smyrli og rakstrinum um Suðuroyarfjørð burturav.

Harafturat er ein felags fyrisiting fyri alt SL, sum so eisini umsitur suðurleiðina, og kostar hon 13 mió.kr. í lønum.

**Suðurleiðin gerst 2 mió.kr. bíligari**

Sakkønir halda, at Smyril kann rekast fyri 14 mió.kr. um árið, ella 2 mió.kr. minni enn verandi rakstur vísir, hóast eitt starv sum hovmeistari kemur afturat.

Við 8 fólkum á landsíðuni (fyri 228.000 kr. um mánaðan,) og við 38 fólkum á sjósíðuni (fyri 892.686 kr.) kostar Smyril 1.120.686 kr. í lønum um mánaðan, ella 14.053.404 kr. um árið.

Hetta eru 2 mió.kr. minni um árið enn verandi rakstur vísir.

Oman á ein dýrari lønarrakstur av Smyrli hevur so almenna reiðaríiðið eina felags fyrisiting fyri oyggjabygda- og farmaleiðir, sum ber ein lønarkostnað upp á 13 mió.kr.

Hvussu stórur partur av hesum lønum eisini kunnu roknast Smyrli til, er torført at meta um, men tað er so ikki til fyrimuns fyri verandi skipan.

**Umsita eisini umborð**

Ført verður fram í uppskotinum, at raksturin gerst bíligari, verður umsitingin løgd í Suðuroy. Omanfyri nevndu tøl benda tann vegin, og ivaleyst kann henda umsiting gerast bíligari, eisini um hon verður liggjandi har hon liggur, bara viljin er til tað.

Tað verður ikki tørvur á so nógvum fólki til sjálva umsitingina, og harafturat er so ætlanin at leggja ein part av umsitingini umborð, so sum vanligt er alla aðra staðni enn hjá Strandfarskipum Landsins í Føroyum.

Manningartalið eigur hinvegin at økjast við einum hovmeistarastarvi, sum kann vinna nýggja skipinum inntøkur við einum dagførdum matstovuvirksemi á hædd við tað besta, sum fæst í landi.

Eitt gott vikuskifti í Suðuroy kann soleiðis taka seg upp umborð á Smyrli á veg suður, og ríkir møguleikar gevast fyri skeiðsvirksemi, uppihaldi og matstovurakstri í hesum sambandi.

**Aðrir fyrimunir**

Eingin ivi er um, at ein røð av fyrimunum eru av at umsitingin av farleiðini liggur so nær brúkarunum sum gjørligt. Tørvurin hjá loklasamfelagnum er eini lokalari umsiting meiri viðkomandi, og allar avgerðir viðvíkjandi planlegging, rakstri, trivnað og trygd umborð verða tiknar so nær brúkaranum sum gjørligt.

"Besta grundarlagið undir samfelagnum er virksemi og trivnaður á øllum plássum í landinum" - og - "miðað verður eftir, at møguligir nýggir almennir stovnar verða lagdir kring landið," hava vit sagt í undanfarnum samgonguskjølum, og gjørdu vit ma. av at skráseta nýggja Smyril á Trongisvági.

Skrásetingin einsamøll kastar einki av sær til lokalsamfelagið har suðuri, men vísandi til almenna hugburðin um eisini at flyta almenn starvsfólk út á jaðaran, verður nú sóknast eftir einum vilja til at flyta eitt ávíst tal av almennum størvum til Suðuroyar at umsita egin viðurskifti.

Siglingin um Vestmannasund er niðurløgd, og tað er Skálafjarðaleiðin eisini. Tá koyrandi verður undir Lorvíksfirði fellur ferjuleiðin har burtur.

Kallsoyar-, Fugloyar-, Mykines-, Skúvoyar-, Sandoyar- og Nólsoyarleiðirnar, sum tá vera eftir, kunna tá, ella beinanvegin um undirtøka er fyri tí, verða lagdar undir eina felags fyrisiting í Suðuroynni. Tað er ikki annað enn rímiligt

**Fleiri pástandir**

Sjálvandi eru fleiri pástandir í tí, sum her er sagt, og sum onkur tí fer at finna sær frægd í at skjóta niður. Tað leggi eg nú ikki so nógv í.

Tað var jú eisini ein pástandur frá mínari síðu, tá ið eg á Kyndilsmessu í fjør reisti málið politiskt um at leggja Øravíkar Hov tunnilin í neðra, og fáa ein skjótari, betri og bíligari tunnil - sum var til fyrimuns fyri brúkaran og sum spardi tí almenna bæði tíð og pening.

Landsstýrismaðurin var tá á veg niðan í tingi við einum óbrúkiligum projektið, sum var ein triðingskostnað dýrari.

Úrslitið gjørdist, at tað málið nú aftur í eitt ár er kannað av sakkønum, sum frammanundan í longri áramál høvdu kannað sama mál. Vónandi síggja vit ta nýggju verkætlanina her á borðinum fyrsta dagin.

Um lagnan av hesum máli verður átøk tunnilsmálinum, veit eg ikki, men hugskotini, her eru nevnd , eru eina eftirmeting verd og vóni eg, at vinnunevndin fer undir eina sakliga viðger av hesum máli, og fær nakað munagott burturúr.

Til ber sjálvandi at biðja tey sum umsita málið, koma á fund og so fáa eitt tilmæli um at halda fram við verandi skipan, ið einki kann bøtast um.

Men tað ber eisini til hjá vinnunevndini at leita aðrar leiðir at søkja sær vitan um skiparakstur - tann vitanin skuldi so ikki trotið her um okkara leiðir.

Vónandi fáa vit so eitt skilagott tilmæli aftur á tingborð, sum gevur suðringum nøkur almenn arbeiðspláss, og sum gevur brúkarunum av Smyrli ta fullu nyttuna av skipinum.

# Stígur í samráðingum

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Fíggjarmálaráðnum*

Semingsfólk eru boðsend at royna seming millum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið, og eitt møguligt verkfall er útsett til 27. mars 2004. Stígur er komin í sáttmálasamráðingarnar, sum Fíggjarmálaráðið hevur við Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið. Í báðum samráðingunum, sum verða førdar í hvør sínum spori, standast trupulleikar av at semjast um sáttmálaviðurskifti kring nýggju Suðuroyarferjuna hjá Strandfaraskipum Landsins.

Eftir at rættilig ferð var komin á sáttmálasamráðingarnar millum fleiri fakfeløg og Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum, og meira enn helmingurin av sáttmálunum eru undirskrivaðir, er nú stígur komin í tvær av samráðingunum.

Talan er um tvær ymiskar tingingar, sum í langa tíð hava verið við Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið. Samráðingarnar við skiparar og navigatørar byrjaðu í november í fjør, meðan fyrsti samráðingarfundurin við maskinmeistararnar var 26. september 2003. Sáttmálarnir við hesi feløg gingu út 1. oktober 2003.

Hóast tingingarnar verða førdar í hvør sínum spori, er stillstøða komin í orsakað av viðurskiftum, sum hava samband við komandi Suðuroyarferjuna hjá Strandfaraskipum Landsins.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur sett fram sjónarmiðið um, at ein ávís vaktarskipan skal verða galdandi umborð. Hesum kravi sær Fíggjarmálaráðið seg ikki føra fyri at eftirlíka, tí tað ber í sær, at ferðaætlanin fyri nýggju ferjuna gerst sera óliðilig og skapar trupulleikar hjá Strandfaraskipum Landsins og ikki minst teimum ferðandi.

Maskinmeistarafelagið hevur alment boðað frá støðu sínari, sum er, at felagið ikki vil hava samráðingar um Suðuroyarferjuna at vera partur av samráðingunum, sum byrjaðu í september. Fíggjarmálaráðið kann ikki góðtaka hesa støðuna hjá maskinmeistarunum. Neyðugt er at hava sáttmálaviðurskiftini fyri nýggja skipið avgreidd í góðari tíð, soleiðis at einki er í vegin fyri, at skipið kann setast í sigling so skjótt, tað ber til. Skipið verður latið eigarunum í heyst.

Tingingarnar við Maskinmeistarafelagið hava seinastu tíðina staðið so mikið stillar, at partarnir í semju hava sent boð eftir semingsfólkunum Alfred Petersen og Jógvan Amonsson. Semingsmenninir hava útsett eitt møguligt verkfall til 27. mars. Enn er ógreitt, nær semingsmenninir fara at royna at finna eina semju millum partarnar.

Í tingingunum við Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur ikki verið neyðugt at senda boð eftir semingsfólkum enn.

Lønardeilin hjá Fíggjarmálaráðnum hjálpir fegin við faktuellum spurningum til omanfyri nevnda mál. Fíggjarmálaráðið hevur telefon 35 22 00.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Landsverkfrøðingurin:

# Martin og Werner seinasta starvsdag á Lambareiði



*Oyvindur Brimnes, stjóri, takkar Werner fyri trúgva tænastu*
*Mynd: Árni Jacobsen / Landsverkfrøðingurin*



*Oyvindur Brimnes, stjóri, takkar Martini fyri trúgva tænastu øll 40 árini*
*Mynd: Árni Jacobsen / Landsverkfrøðingurin*

**Fríggjadagin 27. februar var seinasti arbeiðsdagur hjá Martini Magnussen og Werner Petersen, sum hava starvast hjá Landsverkfrøðinginum á Lambareiði í ávikavist 40 og 20 ár**

Í sambandi við at Martin Magnussen og Werner Petersen, sum hava starvast hjá Landsverkfrøðinginum, høvdu sín seinasta arbeiðsdag fríggjadagin 27. februar, var skipað fyri eini hugnaligari móttøku í kantinuni hjá Landsverkfrøðinginum á Lambareiði hendan dagin.

Eini 30 fólk komu saman at siga teimum báðum farvæl og takka fyri góða samstarvið øll hesi mongu árini. Umframt samstarvsfelagarnar á Lambareiði vóru Oyvindur Brimnes, stjóri, Óli M. Petersen, leiðari á framleiðsludeildini, Jólsvein Joensen, rakstrarverkfrøðingur á framleiðdeildini og Súsanna Mc. Birnie undir Leitinum, kunningarfólk við úr Havn. Borðreitt var við smyrjibreyði og einum drekkamunni aftur við.

Umframt stjóran, Oyvind Brimnes, helt eisini leiðarin á framleiðsludeildini hjá LV í Havn, Óli M. Petersen, eina talu fyri teimum báðum. Økisleiðarin í Eysturoynni, Árni Jacobsen nýtti eisini høvi at takka teimum fyri tíðina, og Jólsvein Joensen segði nøkur orð á vegnum, tá ið hann handaði teimum blómur frá stovninum.

Martin Magnussen er føddur í 1934. Tá ið landið í 1964 yvirtók umsitingina av vegunum, var Niels Pauli Hansen settur sum økisleiðari (vegaumsjónarmaður) fyri Eysturoynna, og Martin var settur í starv hjá Niels Paula 1. mars 1964.

Fyrstu árini koyrdi hann maskinur og var við til at byggja knúsiverkið á Lambareiði, sum byrjaði at knúsa grót í 1965. Hetta verkið var bygt til at framleiða tilfar til viðlíkahald av vegakervinum og til asfalteringar av hesum, sum byrjaðu tá.

Fyrsta asfalteringin í Eysturoynni var frá Skipanesi og inn eftir í september 1966. Í 1968 var Martin alment settur sum formaður á Skervverkinum á Lambareiði, og tá vóru 23 mans á verkinum.

Werner Petersen er føddur í Rituvík í 1932. Hann byrjaði at arbeiða hjá Landsverkfrøðinginum 2. februar, 1985. Hann var fyrst í smiðjuni á Lambareiði og síðan á skervverkinum frá 1987-1992, har hann hevði ábyrgdina av viðlíkahaldinum. Frá 1993-2002 røkti hann skervverkið frá smiðjuni á Lambareiði og fram til í dag, hevur hann verið í viðlíka-haldinum og rikið verkið uppi á Hústoft.

Anna Askham 103 ár:

# Elsta fólkið í Føroyum fyllir í dag



Í dag, 5. mars, fyllir Anna Askham í Havn 103 ár. Hon hevur tað framvegis gott, er frammi hvønn dag og trívist væl á Ellisheiminum.

Anna er úr Havn, foreldrini vóru Sofía og Jákup Mørkøre, mamman úr Kollafirði og pápin úr Leirvík.

Hon giftist við Símun Asham úr Havn, sum hevði Askhams Smiðju í Lítluvík saman við brøðrunum Tórsteini og Archibald.

Anna og Símun fingu átta børn, har tvey av teimum doyðu sum smá. Hini seks børnini eru: Bergtóra, ið er gift við John Justinussen úr Havn, og býr í Havn, Torleif, ið er giftur við Marjun Gøthe úr Norðragøtu, tey búgva í Løgstør í Danmark, Svenn, ið er giftur við Elin Beder úr Vági, og býr í Havn, Sonja, ið er gift við Róki Dalsgaard úr Skálavík, og býr í Havn, Martha, ið er gift við Hans David Johansen, og býr á Strondum, og Johannes Juul, ið er giftur við Gunnvá Nolsøe úr Vági, og býr í Havn.

Anna hevði sera gott handalag, hon hevur prógv frá Kunstflidsskolen, og hon hevur t.d. seymað fløgg fyri ítróttarfeløg og hópin av øðrum pløggum. Sum ung tók hon nógvar myndir, sum hon framkallaði sjálv. Alt hetta gjørdi hon hóast hon hevði stórt hús at passa og ikki minst at vaska klæðir hjá manni og synum, sum teir flestu vóru maskin- og smiðumenn.

Føðingardagurin verður hildin á Ellisheiminum 5. mars millum kl. 16.00 og 19.00.

### Dagurin

**5. mars. Teophilus**, deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir *hin guðelskandi.*

Óluva Jensen, Skopun:

# 25 ára starvsdag sum heimahjálpari



Í dag 5. marts hevur Óluva Jensen í Skopun arbeitt 25 ár sum heimahjálpari. Starvsfólkið á heimarøktini møtast á ellisheiminum Norðuri á Skeri kl. 14.00 í dag til móttøku.

Hesi 25 árini Óluva hevur arbeitt sum heimahjálp, hevur hon tikið sær sera væl av temum gomlu bæði í og uttan fyri arbeiðstíð.

Hon hevur verið í skúlanevndini í Skopun og í skúlastýrinum fyri Meginskúlan. Hon er eisini virkin limur í Sandoyar Javnaðarfelag. Hon var í mong sunnudagsskúlalærari í Betania í Skopun.

Óluva er sera arbeiðssom og er ófør at kokkast og at gera mat til t.d. ervi, brúdleyp og veitslur. Hon er ein av teimum trúføstu, sum altíð minnist til síni nærmastu og er altíð klár við eini hjálpandi hond uttan á nakran hátt at seta seg sjálva í miðdepulin.

Hon er gift við Peturi Jensen úr Skopun, tey fingu trý børn, Leinu, Jákup Eli og Marjun. Leina andaðist í 1977 bert 10 ára gomul. Óluva eigur eisini tvey ommubørn, sum hon tekur sær nógv av.

Óluvu verður ynskt hjartaliga tillukku við starvsdegnum.

**x**

### 103 ár

Í dag, 5. mars, verður elsta fólk í Føroyum, Anna Askham, 103 ár.

Dagurin verður hildin á Ellisheiminum millum kl. 16.00 og 19.00.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin 6. februar 2004 so hugnaligan og minnisríkan.

Túsund takk fyri gávur, blómur, fjarrit og uppringingar, takk til øll, sum hjálptu til uppá ymiskar mátar.

**Heilsan Suffía og John Høj**